Fróðskaparsetur Føroya

28. apríl 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 4/2005

Tíð: Hósdagin 28. apríl 2005, kl. 13.00-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 3/2005 setursráðsfundi 31. mars 2005.** Góðkend

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarløgtingslóg 2006. Fyrireiking.** (J.nr. 0015-01595). Málið varð umrøtt. Deildirnar verða bidnar um at lata Setursskrivstovuni neyvar metingar fyri leysalærarar, próvdøming, metingar og inntøkur í seinasta lagi 18. mai. Setursskrivarin ger framrokningar fyri føstu lønirnar og felags økið. Uppskot til umsókn til FL 06 skal leggjast fyri á komandi setursráðsfundi.

4. **Undirvísingarhøli. Avtalan við Sjómansskúlan.** (J.nr. 0030-00398). *Fundarskjal: Notat frá setursskrivaranum, dagfest 14.4.05, 2 s.* Rektarin og setursskrivarin greiddu frá málinum og teimum møguleikum, sum eru í boði nú. Málið fekk drúgva umrøðu. Semja um at møguleikarnir eru áhugaverdir og arbeiðast skal víðari við málinum. Setursskrivstovan sendir deildunum tilfar at viðgera og taka støðu til á deildunum.

5. **Uppskot til próvdómarareglugerð.** (J.nr. 0040-01514). *Fundarskjal: Uppskot frá Mentamálaráðnum, dagfest 29.3.05, 3 s., svar frá deildunum, dagfest 14.4.05, 20.4.05 og 28.4.05.* Deildirnar samdar um at mæla til fleiri broytingar og at strika okkurt. SSS


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

ger uppskot til skriv, sum verður sent deildunum saman við viðmerkingunum frá deildunum, áðrenn tað verður sent Mentamálaráðnum.

6. **Ráðgevandi Nevndin fyri Norðurlandahúsið. Mentamálaráðið biður Fróðskaparsetrið um uppskot til lim í nevndina, ein mann og eina kvinnu.** (J.nr. 0011-01592). Mælt verður til at velja Eivind Weyhe, sum umboðar Fróðskaparsetrið í nevndini nú, ella Anniku Sølvará.

7. **Umsókn frá Kirsti Hansen um fíggjarligan stuðul til almenna framløgu av verkætlanum um máltøkni.** (J.nr. 0015-01598). *Fundarskjal: Umsókn, dagfest 20.4.05, 2 s.* EW gjørdi vart við, at Føroyamálsdeildin eftir áheitan hevur játtað at stuðlað við at rinda helvtina av einum døgurða, sum verður í sambandi við tiltakið. Fróðskaparsetrið hevur ikki møguleika at stuðla slíkum umsóknum. SSS svarar umsøkjaranum.

8. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 13.4.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 15.4.05.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 19.4.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Býti av játtan úr *Grunni Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* at staðfesta.** (J.nr. 0073-01534). Staðfest.

10. **Áheitan frá Mentamálaráðnum um uppskot til ynski og krøv til komandi sáttmálasamráðingar. Svarskriv at staðfesta.** (J.nr. 0020-01589). Staðfest.

**Kunningarmál:**

11. **Nýggjur telduvørður, Dávur Sørensen, er settur í starv. Hann byrjar fyrst í mai.** (J.nr. 0023-01570 og 0021-01570).

12. **Luttøka á evnis-/kunningardøgum:**
   a. **Evnisdagur í Norðurlandahúsinum 2. mai 2005 "Samspæl millum politikk og fyrisiting", Løgmansskrivstovan skipar fyri. Annika Sølvará luttekur.** (J.nr. 0056-01596).

b. **Evnisdagur á Føroya Sjómansskúla tann 11. mai 2005 "Digitala kollveltingin – hvørvir framtíðin?", Føroya Landsskjalasavn skipar fyri. Annika Sølvará og Ruth Johansen luttaka.** (J.nr. 0056-01588).
c. **Kunningardagur í Norðurlandahúsinum 27. mai 2005 um fíggjarstýring hjá tí almenna. Fíggjarmálaráðið skipar fyri. Annika Sølvará og Winny í Pætursastovu luttaka.** (J.nr. 0056-01597).

**13. Útgáva: Women's Participation in Decision-making Processes in Arctic Fisheries Resource Management, Arctic Council 2002-2004.**

**14. Innbjóðing til KT-dag í Norðurlandahúsinum 6. mai 2005, KT-felagið skipar fyri.** (J.nr. 0056-00154).

Frágreiðing: Annika Sølvará